# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## ALS til sjófólkið

Tað er í tøkum tíma, at spurningurin um viðurskiftini hjá føroyskum sjófólki við ALS skipanina verður tikin upp. Her er talan um eitt sosialt og vinnupolitiskt mál. Tað er ikki løgið, sjómenn eru misnøgdir við ALS. Teir skulu gjalda til skipanina, men fáa einki úr henni. Sum skipanin virkar í dag, mugu sjófólk sigast upp, skulu tey sleppa inn í skipanina. Hetta merkir, at tá skip fara á beding ella liggja, so merkir tað fyri manningina, at hon ongan stuðul fær ALS. Tað ber sjálvsagt illa til hjá reiðarínum at siga manningini upp, fyri at hon skal fáa útgjald frá ALS. Við uppsøgn fylgir, at manningin er tøk á arbeiðsmarknaðinum, og kann tí av ALS krevjast í annað starv. Vinnumálaráðharrin hevur gjørt av, at øll skipanin skal endurskoðast fyri at fáa greiði á ivaspurningum viðvíkjandi sjófólki og viðurskiftum teirra við ALS skipanina.

Fiskivinnan hevur trupulleikar av ymsum sløgum at dragast við. Ein trupulleiki er spurningurin um rekrutteringina. Tað var tann tíð, tá so at siga einhvør føroyskur unglingi droymdi um eitt spennandi og vælønt lív á sjógvi. Hóast sjólívið mangan bæði var vandamikið og strævið, so dróg havið ungar menn og lutvíst eisini kvinnur til sín. Hetta er alt broytt nú, og reiðaríini hava, við fáum undantøkum, trupult við at fáa nóg mikið av fólki til skipini. Tað eru sjálvsagt nógvar ymiskar orsøkir til henda trupulleika. Ein orsøkin er, at sjófólk í ávísum førum ikki hava ikki somu sømdir sum løntakarar á landi. Tá rætt skal vera rætt, so hava fiskimenn hinvegin ávísar skattligar fyrimunir og eitt nú telefonfrádrátt, men hesi viðurskifti uppvega als ikki teir vansar, ið fiskimaðurin annars hevur í sínum arbeiði umborð. Tað er tí mest frá einum vinnupolitiskum sjónarmiði eisini eitt gott og rætt stig at taka at javnseta løntakarar á sjógvi og landi við atliti at ALS. Hetta kann uttan iva lætta um rekrutteringina til teir partar av fiskiskipaflotanum, sum í løtuni hava tungt við at fáa fólk.

Ein annar vinnupolitiskur partur av hesum máli snýr seg um FAS skipanina. FAS-skipanin er eisini undir Vinnumálaráðnum, sum nú hevur sett sær fyri at fáa skipanina at virka soleiðis, at hon verður áhugaverd fyri útlendsk reiðarí. Vit hava áður viðgjørt hetta mál, eitt nú í serblaðnum Vinnan og í rásini. Tað er uppá tíðina, at FAS skipanin fæst at virka eftir ætlan, soleiðis, at hon kann gerast eitt veruligt vinnuligt alternativ. Her skulu gerast ymsar broytingar og tillagingar, og í hesum høpi er ALS skipanin ein trupulleiki, sum ein loysn má finnast á. Vinnumálaráðið eigur at finna eina loysn fyri tey sjófólk, sum sigla við skipum, ið eru skrásett undir FAS og koma við uppskotum um lógarbroytingar samsvarandi. Við at endurskoða ALS kann sostatt fáast loysn á einum sosialpolitiskum so væl sum einum vinnupolitiskum trupulleika.

**Sosialurin**

## Hvalbiartunnilin má raðfestast

**RÚNI THOMSEN**
Hvalba



Nú er so nýtt landstýrið tilnevnt og nýggjar nevndir skipaðar. Tað tók ikki formanninum í fíggjanevndini nógvar tímar at fara út aftur við sínum lokalpolitikki fyri at verja sínar veljarar á Viðareiði.

Eg meinti, at nú skuldi tað vera liðugt við lokalpolitikkinum, men hugsi at hann sleppa vit ikki so av við.

Sambart samgonguskjalinum so stendur:

"Landsstýrið hevur skyldu at tryggja hóskandi ferðasamband kring alt landið. Eitt væl útbygt og væl virkandi samferðslukervi hevur alstóran týdning fyri trivnaðin í útjaðaranum og fyri vinnuna og trivnað í landinum sum heild."

Eg eri ikki ósamdur í at tunlarnir norður um fjall eru ótíðarhóskandi, men at tørvurin skal vera størri har, heldur enn at dagføra tunnilin til Hvalbiar, eina av størstu vinnulívsbygdum í landinum, tað er ikki til at fáa eyga á.

Stórtsæð hvønn dag skal ein sergjørdur trailari trýsta seg fram gjøgnum Hvalbiartunnilin við fiski frá flakavikinum í bygdini. Fleiri av hinum fyritøkunum í bygdini eru eisini raktar av einum ótíðarhóskandi tunnli. Samstundis eru nógv fólk sum dagliga pendla suður og norður gjøgnum tunnilin hvønn dag til arbeiðis, lækna, handils ella um tey t. d. skulu av oynni.

Hvalba er vinnulívsbygd fram um nógvar og er tunnilin okkara lívæðr og samband til útheimin, tað er tí mín staðiliga áheitan til okkara høga ting bæði til tinglimir, sum koma úr Suðuroynni og teir, sum siga seg arbeiða fyri "Suðurføroyum" um at standa saman og raðfesta við skilið.

Tá nú farið verður undir at dagføra teir gomlu tunnlarnir, hví so ikki byrja við tí elsta.

Hetta er eisini ein áheitan á suðringar um at standa saman so vit kunnu fáa dagført seinastu partarnir av undirstøðukervinum í oynni.

## Kringvarp Føroya – nýtt fólk á brúnni

**UNI NÆS**
Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag



1. oktober tók nýggj leiðsla við í Kringvarpi Føroya. Tey fimm saman við stjóranum hava nú ábyrgdina av at geva føroyingum gott útvarp og sjónvarp. Tillukku við starvinum og góðan arbeiðshug.

Spennandi verður, hvussu Kringvarpið fer at vera við nýggju leiðsluni og nýggja stjóranum, sum tók við starvinum í vár.

Nógv hevur verið tosað og skrivað um tað fyrisitingarliga hjá Kringvarpinum síðani útvarpið og sjónvarpið vórðu løgd saman. Nú er vónandi komið á mál. Tíðin er komin at geva okkum øllum eitt fjølbroytt og innihaldsríkt kringvarp.

Sum kunnugt verður stórur partur av Kringvarpinum fíggjað við hyggjara- og lurtaragjaldi. Vit eru sostatt øll við at gjalda fyri Kringvarpið. Soleiðis hevur tað altíð verið, síðani vit á fyrsta sinni fingu útvarp og seinni sjónvarp.

Á politiska økinum verður tikið til, at skulu vit valda so skulu vit eisini gjalda. Tá ið tað er talan um Kringvarpið so letur til, at hyggjarin og lurtarin bert skal gjalda. Vit hava nakrar stovnar her á landi, sum lata tey sum gjalda verða við, har avgerðirnar verða tiknar t.d. SEV og Sjúkrakassin. Men fyri Kringvarpið skulu vit bert gjalda.

Í Føroyum finst bert eitt skipa hyggjara- og lurtarafelag: Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag, KLH, sum varð stovnað í 1959. Síðani felagið varð stovnað, hevur tað fylgt við í útvarps- og sjónvarpsarbeiðinum. Felagið hevur verið umboðað í útvarps- og sjónvarpsnevndum hesi mongu árini heilt fram til 2006, tá ið nýggja Kringvarpslógin varð sett í gildi. Við nýggju lógini gekk hetta ikki longur. Hetta harmaðist felagið sjálvandi um, tí hildið varð, at tað var rímiligt, at einasta skipaða lurtara- og hyggjarafelagið í landinum kundi verið umboðað í stýrinum fyri Kringvarpið. Men tað hildu tey ikki, sum gjørdu nýggju Kringvarpslógina.

Nú hevur nýggja leiðslan í Kringvarpinum lagt frá landi. Tað er okkara vón, at leiðslan livir upp til galdandi lóg, har tætt samband verður millum leiðslu, lurtara og hyggjara. Spennandi verður, hvussu vinalig leiðslan fer at vera móti lurtaranum og hyggjaranum, tá ið talan er um hugskot, opinleika og ávirkan.

Tað er ikki nóg mikið bara við einum góðum vilja, men vón okkara er, at leiðslan ger nakað ítøkiligt at skipa soleiðis fyri, at góð hugskot frá hyggjarum og lurtarum verða viðgjørd í álvara, og at fólk í Kringvarpinum verða sett til at gera hugskotini til veruleika saman við lurtaranum og hyggjaranum.

Hetta er eisini í tráð við galdandi Kringvarpslóg, har tað m.a. verður sagt verður sagt um Public service – skyldur... at

Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga. (§10) … og umframt egnar sendingar kann Kringvarp Føroya eisini kringvarpa sendingar, ið onnur framleiða (§12).

Nýggjur stjóri, nýggj leiðsla. Vit liva eisini í vónini, at nú verður eisini hugsað nýtt og fjølbroytt í Kringvarpi Føroya.

Góða eydnu!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.